# Hetta fært tú sum álitisfólk

- Grundútbúgving, skipað í tveimum modulum
- Luttøku á tveimum álitisfólkafundum um árið
- 1 eyka lønarstig í lønartalvuni

# Álitisfólkaverjan

- Álitisfólk hava serliga verju móti uppsøgn
- Longd uppsagnartíð í mun til aðrar limir
- Uppsøgn av álitisfólki er álvarsamt mál, ið skal viðgerast á sáttmála- og leiðslustigi



starvsfelagið

# Sambandið við felagið

- Sum álitisfólk hevur tú tætt samband við felagið
- Tú ert í tøttum samstarvi við felagið í starvsfólkamálum á arbeiðsplássinum
- Tú handar felagnum sáttmálakrøv vegna limirnar
- Tú verður hoyrd/ur í samband við sáttmálasamráðingar
- Tú upplýsir onnur starvsfólk um fyrimunir við at vera limur
- Tú arbeiðir fyri at fáa fleiri at gerast limir

# Set teg í samband við okkum

**Starvsfelagið**
**J. H. Schrøtersgøta 9**
**Boks 165, FO-110 Tórshavn**
**Tel. (+298) 61 48 68**
**starvsfelag@starvsfelag.fo**



starvsfelagið

# Álitisfólk

# Uppgávan hjá tær mótvegis limum

- Vera sjónlig/ur og kunna limir regluliga um semjur, tiltøk og onnur felagstíðindi
- Kenna sáttmálan og aðrar avtalur
- Ansa eftir at lógir, reglur og sáttmálar verða hildin í sáttmálaøkinum
- Tryggja at starvsfólkini verða hoyrd og hava ávirkan á arbeiðsplássinum
- Arbeiða fyri at fáa hugskot hjá limum við, bæði í tí dagliga og tá nakað nýtt skal setast í verk
- Stuðla limunum og søkja loysnir í møguligum ósemjum
- Umboða limirnar í starvsfólkamálum
- Skapa sambond millum limir, leiðslu og aðrar partar



# Uppgávan hjá tær mótvegis leiðsluni

- Virka fyri góðum samstarvi millum leiðslu og starvsfólk
- Hava samskifti við leiðsluna og bera boðskap víðari
- Arbeiða fram ímóti semjum
- Vera framskygd/ur og halda seg framat við hugskotum
- At fáa ávirkan á avgerðir
- Vera við, tá ið nýggj átøk skal setast í verk
- Vera við, tá ið bygnaðarbroytingar verða settar í verk




Álitisfólkini eru ein sera týdningarmikil liður í arbeiði felagsins. Sum umboð felagsins er tað tín, starvsfólk venda sær til í truplum støðum og við spurningum. Tú ert andlit felagsins úteftir, bæði yvir fyri limum, leiðslum og arbeiðsplássum sum heild.

Vit takka tær fyri tað góða arbeiðið, tú gert.

starvsfelagið